VIÐMERKINGAR

# Kongaliga vitjanin og Tjóðveldisflokkurin

Alfred Olsen
*løgtingsmaður*



**Bý- og bygdaráðini hava øll rós uppiborið fyri tað móttøku og fyriskipaðu rundvísing fyri kongafamiljuni, sum tit kláraðu sera væl og har nógv av tiltøkum tykkara vóru genial.**

**Vitjanin vísti eisini, at vit í Føroyum eru fyrikomandi, hjartalig og gestablíð, og vístu kongafamiljuni eina erliga og hóskandi virðing.**

**Vinnulívið**
Sambandsflokkurin hevur fleiri ferðir víst á, at vinnulívið eigur at vera við og brúka tað fjølmiðla- og vinnuliga fokus, sum altíð er knýtt at eini kongaligari vitjan, óansæð um henda er í Føroyum ella úti í heimið.

Vit skulu vera við, tí vit hava nógv sera dugnalig vinnulívsfólk, umframt fleiri evnaríkar tóna- og mótasmiðir, sum hava format at gera seg galdandi úti í heimið.

Drotningin vísti eisini á hetta á tíðindafundinum og legði upp til, at mótaog nótasmiðir okkara gera vart við seg og síni produktir, og bjóða hesi fram.

Eg vóni tí, at á næstu uttanlandsferð hjá drotningini, eru nøkur av okkara vinnulívs- tóna- og mótafólkum við í ferðalagnum.

**Veðrið**
"Veðrið má sær ráða" og tað gjørdi tað sanniliga í døgunum kongavitjanin vardi, og var eisini orsøkin fyri, at t.d. vitjanin úti í Mykinesi mátti avlýsast, uttan at hetta skapti trupulleikar fyri vitjanina í Vágunum, bert spell at tit í Mykinesi ikki fingu vitjan av tí unga kongaliga parinum.

**Tjóðveldisflokkurin**
Tíverri megnaði formaður Tjóðveldisfloksins ikki at vísa gestablídni og virðing fyri teimum kongaligu gestunum, men ákærdi Margrethu drotning fyri at blanda seg í politikk, tá hon nam við lógir sum eru samtyktar í Løgtinginum og Fólkatinginum.

Formaður Tjóðveldisfloksins helt seg sikkurt spæla ein trumf út, tá hann eftir røðuna hjá Margrethu drotning í Norðurlandahúsinum boðaði frá, at hann hereftir ikki kom at luttaka í kongavitjanini, sum um tað skuldi hava nakrar fylgir fyri vitjanina. Tað hevur tað sjálvandi heldur ikki haft, og vit kunnu fegnast um, at vitjanin helt fram ótarnað, uttan luttøku av formanni Tjóðveldisins.

**Yvirvurdera seg sjálvan**
At formaðurin í Tjóðveldisflokkinum yvirvurderar sín egna leiklut, er harmiligt fyri hann sjálvan, men tað sum harmar meg nógv meira er, at hann við ógrundaðum álopum móti Margrethu drotning er við til at skaða viðurskiftini millum Føroyar og Danmark, og millum føroyingar og danskarar.

Men tíverri er hetta ikki fyrstu ferð, tí hvør minnist ikki tíðina frá 1998 og fram til seinasta val, hvussu Tjóðveldisflokkurin royndi at niðurbróta tey ríku og gagnligu bondini sum eru millum Føroyar og Danmark, millum føroyingar og danskarar, til skaða fyri báðar partar.

**Tjóðveldisflokkurin ongan leiklut**
Tað hava verið føroyingar, ið hava hildið, at tað bleiv Tjóðveldisflokkurin sum kom at hava leiklutin at fremja broytingar í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark, men síðani seinasta løgtingsval og somuleiðis eftir kongavitjanina, er flestu føroyingum greitt, at Tjóðveldsiflokkurin ongan gagnligan leiklut kemur at hava í normaliseringini av viðurskiftunum í ríkiseindini, ið umfatar Grønland, Føroyar og Danmark, men at leisturin verður nýskipanaruppskotið hjá Sambandsflokkinum.

Vónandi kemur tað ógrundaða álopið hjá Tjóðveldisflokkinum á Margrethu drotning, bert at hava ein avmarkaðan skaða fyri lesandi og fastbúgvandi føroyingar í Danmark, men eitt er vist, nakað gagnligt árin hevur álop Tjóðveldisfloksins ikki fyri nakran.

# – Ein dreymur gongur út við nýggju fløguni

**– Endamálið er heilt greitt: Eg ynski at boða gleðiboðskapin gjøgnum andaligan sang, sigur 63 ára gamli Hallgrím Miðberg, sum um dagarnar gevur út fyrstu fløgu sína við egnum verkum. Sjálvur spælir hann steelguitar á fløguni**

TÓNLEIKUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Hallgrím Miðberg hevur skrivað mong orð og mong løgini. Nú verða 10 teirra at hoyra á nýggju fløguni "Fagrari sang"*

**Fløga:** Hallgrím skrivaði í síni tíð sangin "Eg siti so eina", sum Vestmenn gjørdu til ein sannan slagara.

Eftir at verða umvendur fyri 40 árum síðani hevur hann skrivað andaligar sangir ístaðin. Eftir hann liggja fleiri sangir, men nú er so møguleiki hjá fólki at hoyra 10 teirra á nýggju fløguni "Fagrari sang".

– Eg havi leingi droymt um at geva eina slíka andaliga fløgu út, sigur Hallgrím, sum í mong ár hevur havt egið bakarí í Saltangará. Eg havi havt úr at gera við bakarínum, og havi tí ikki havt stundir at hugsa um slíkt.

– Men tá eg gavst at baka fyri trimum árum síðani, kom henda hugsanin fram aftur. Og nú, - umsíðir gjørdist tað so til veruleika, sigur Hallgrím Miðberg.

Fløgan er nú at fáa um alt landið, og so er bert eftir at vóna, at fólk fara at taka væl ímóti fløguni.

– Hetta er ein rólig fløga. Men eg vænti, at hon fer at vinna við tíðini, sigur hann.

## Fimm ørindi í eina nátt

Á nýggju fløguni eru 10 sangir, har Hallgrím sjálvur í flestu førum eigur bæði orðini og løgini.

Tann elsta sangin á fløguni skrivaði hann í 1972 – sangin "Ríkur maður var". Og Hallgrím minnist sera væl, hvussu hesin sangurin kom í lag.

Hann kendi væl frásøgnina í Bíbliuni um ríka mannin og Lazarus, soleiðis sum hon stendur skrivað í Lukasi kapittul 16.

– Eitt kvøldið var eg á møti, har hálvi føroyingurin, Gudmundur Johannesson úr Skotlandi, sang ein sang við hesum lagnum. Lagið fangaði meg beinanvegin, tí eg helt tað vera so gott. Eg slapp simpelthen ikki frá tí – tað nærum ringdi inni í høvdinum á mær allatíðina.

– Tá eg kom heim av møtinum hetta kvøldið, kom henda frásøgnin fram fyri meg beinanvegin. Og eftir stuttari løtu hevði eg skrivað trý tey fyrstu ørindini í sanginum. Um náttina vaknaði eg, og varð inspireraður at skriva meiri, og soleiðis komu tvey tey seinastu ørindini.

– Tað er einki broytt í versunum. Tey eru júst tey somu sum vórðu skrivað hetta kvøldið og hesa náttina fyri 33 árum síðani, sigur Hallgrím Miðberg.

## Persónlig trúgv

Sangur og tónleikur hevur altíð verið ein partur av lívinum hjá Hallgrími. Longu sum 19 ára gamal skrivaði hann sín fyrsta sang.

Neyvan mundi hann gruna tá, at hesin sangurin fleiri ár seinni skuldi gerast ein sonn landaplága og evergreens í føroyskum tónleikahøpi – sangurin "Eg siti so eina við bálið í kvøld".

Í heimbygdini Vestmanna spældi hann við í fleiri bólkum, og tá hann í 1965 kom til persónliga trúgv á Jesus, slepti hann ikki tónleikinum. Heldur hinvegin.

Hann var ein teirra, sum tók stig til stovnan av tí so vælkenda og vældámda andaliga bólkin "Midnáttarsangbólkin" fyri júst 40 árum síðani. Hesin bólkurin hevur eisini verið við í útgávum, men sjálvur hevur Hallgrím ongatíð givið nakrar av sínum egnu sangum út.

- Nú helt eg at tíðin var komin til hetta. Og tí havi eg eisini lagt dent á, at sangirnir á fløguni skulu vera slíkir, sum fólk ikki hava hoyrt áður, sigur hann.

### Fløgan "Fagrari sang"

**Tónleikarar:**
James Olsen, trummur
Arnold Ludvig, bass
Ólavur Øster, guitar
Jákup Zachariassen, el. guitar/dobro/steelguitar
Finnur Hansen, ljómborð
Hallgrím Miðberg, steelguitar
Dánjal Zachariassen, slagverk
Elsebeth Lassaberg, Paula Jespersen og Jóhan Magnus K. Olsen, kór.
**Ljóðbland:** Jákup Zachariassen
**Mastering:** Óli Poulsen
**Upptøka:** Útvarp Føroya og JakZac Studio

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við